## Tímalærari í alis- og evnafrøði.

Av tí at ein av ársvikarum okkara fer í annað starv eru nakrir undirvísingartímar í alis- og evnafrøði leysir at søkja á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði í **tíðarskeiðnum 1. oktober 2007-30. juni 2008.**

Setan fer fram sambært sáttmála millum YF (Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara) og Fíggjarmálaráðið.

Umsøkjarar eiga at hava hægri útbúgving á kandidatstigi ella líknandi. Lesandi á kandidatstigi uttan endaligt prógv kunnu eisini søkja.

Umsóknir saman við avriti av prógvum ella úrskrift av próvtøkubók skulu vera rektaranum í hendi í seinasta lagi **hósdagin 20. september kl. 12.00.**

Til ber at fáa meira at vita um starvið við at venda sær til Mikkjal Helmsdal, rektara á telefon 218404 ella á telduposti mikkjal.helmsdal@skulin.fo

**Føroya Studentaskúli og HF-skeið Hoydalar**
FO-188 Hoyvík · Telefon 312973 · Telefax 318624
Teldupostur skrivstovan@hoydalar.fo · Avgreiðslutíð: Kl. 08.00 - 15.30

Sosialurin
Sosialurin í

Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Varaleiðari og pedagogar til Sambýlið á Fugloyarvegi 9 – Tórshavn

Hesi 3 størvini eru leys at søkja til 1. oktober ella eftir nærri avtalu:

**Varaleiðari - fulltíðarstarv**
**Pedagogur - fulltíðarstarv**
**Pedagogur - 75% starv**

Til Sambýlið á Fugloyarvegi 9 hoyra tvey onnur sambýli – annað á Grønlandsvegi 59 og hitt er í Svanga 24. Talan er sostatt um trý sambýli, har 6 menningartarnað fólk búgva í hvørjum húsi. Nøkur teirra hava stóran tørv á hjálp og onnur meira vegleiðing og stimbran til at klára tær ymsu uppgávurnar sjálvi. Umsøkjarin má tola, at uppgávan fevnir um nógv húsligt arbeiði, at skipa og strukturera arbeiðið soleiðis, at húsfólkini klára sínar uppgávur.

**Setunartreytir:**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um pedagogar, ið frammanundan eru tænastumaður verður settur í eitt av størvunum heldur tænastumannasetanin fram og verður lønin sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um ongin pedagogur søkir starvið, verður starvið sett við hjálparfólki sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Setanarøkið er Nærverkið við fyribils tænastu í Trivnaðartænastuni.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran Eydnu Nicolajsen á telefon 215424

**Umsókn:**
Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu sendast til:

**Sambýlið**
Fugloyarvegur 9
100 Tórshavn
Stílað: Eydna Nicolajsen

**Umsóknarfreist: 28. september 2007**

**Les meira á www.naerverk.fo / leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

